

## Nýggj hús í miðbýnum til sølu

Nýggj hús í miðbýnum, Nólsoyar Páls gøta 6, í 3 hæddum 3 x 50 m$^2$. Grundøki: 125 m$^2$. Húsini eru innrættaði sum 3 íbúðir á 50 m$^2$, ein á hvørji hædd.

Húsini eru BD60 brandbjálvað ímillum íbúðirnar, væl bjálvað og ventilarað við »luft til vatn« hitaanleggi. Húsini liggja í hugnaligum umhvørvi.

Kann seljast sum stakar íbúðir ella sum heil hús.

**Ring og spyr/frætt á tlf. 28 40 10 / 21 04 03**

**Sí myndir av íbúðunum á www.123hjemmeside.dk/frifra**

Røktar- og umlættingarheimið

*Lágargarður*

## Hárfríðkari til Lágargarð

Við hesum verður biðið um tilboð frá áhugaðum hárfríðkarum um hárviðgerð á Lágargarði.

Tilboðið skal vera útgreinað viðvíkjandi ymisku hárviðgerðunum, og við atliti til, at høli við hita, vatni og øllum amboðum eru til taks, og at heimið rindar alt tilfar.

Arbeiðsdagar og -tíðir verða sambært avtalu, og í samstarvi við starvsfólkið á eindunum.

Á Lágargarði eru 3 eindir við 16 búfólkum á hvørji eind. Haraftrat er dagstovnur, har uml. 40 heimabúgvandi pensionistar koma um vikuna.

Krav til tilboðsgevaran er, at viðkomandi hevur áhuga í hárfríðkan innan eldraøkið, og hevur góð samstarvsevni.

Tilboðsfreist 17. november 2008.

Tilboðini skulu sendast til:

**Lágargarð**
att. Meta av Fløtum, leiðari
Stoffalág 84
Postboks 1188
FO-110 Tórshavn

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður 26. nov. 2008 kl. 17 í Gøtu skúla.

Skrá sambært lógini.

**Skúlaleiðarafelag Føroya**

VESTMANNA

## K U N N G E R Ð

**um skúlastýrisval 11. november 2008**

**Val til skúlastýrið** í Vestmanna Kommunu verður týsdagin 11. november 2008. Valið fer fram samstundis sum bygdarráðsvalið og á sama valstaði, í ítróttarhøllini í Vestmanna.

Vallistin liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá fríggjadegnum 24. oktober til týsdagin 4. november 2008. Opið er gerandisdagar kl. 9 – 15.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin latast formanninum í valnevndini (Heðini Winther Olsen, tlf. 274337), sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

**Uppstillingarfundur** verður hildin í aulini í Vestmanna skúla mikukvøldið 29. oktober kl. 19.00.

**Á hvørjum valevnislista** kunnu vera í mesta lagi 6 valevni. Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Harumframt skal listin vera undirskrivaður av í minsta lagi eins nógvum uppstillarum, sum talið á uppstillaðum valevnum. Ein stillari skal vera tilskilaður á listanum sum ábyrgdarhavandi.

Valevnislistin skal latast inn av einum stillara til Kommunuskrivstovuna ella Heðin Winther Olsen, valnevndarformann, í seinasta lagi týsdagin 4. november 2008 kl. 18.00.

**Vestmanna Kommuna**

## Fuglafjarðar skúli

**Felags foreldrafundur verður í fimleikahøll skúlans mánakvøldið 27. oktober 2008 kl. 19.00.**

**Skrá:**

1. Ársfrágreiðing 2007-2008 frá skúlastýrinum.
2. »Er fólkaskúlin fyri øll... ?« Framløgur: Óli Wolles, fm. í Javna og Hans Jón Thomsen, NSR-Tænastan.
3. Kunning um Skúlastýrisvalið 11. november 2008. Møguleiki at gera lista til Skúlastýrisvalið.

Næmingar syngja og spæla. Høvi verður at fáa ein drekkamunn.

**Fuglafjarðar skúli og Skúlastýrið**

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður**

TVØROYRAR KOMMUNA

## Býráðsval og skúlastýrisval 11. novembur 2008

**Til veljarar í Tvøroyrar kommunu**

Valini fara fram í skúlahøllini í Trongisvágs Skúla Frá kl. 10.00 til 20.00

Valkort til býráðsvalið verða send veljarunum.

Seinasta freist at greiða brævatkvøðu til býráðsvalið 11. novembur er 10. novembur.

Tey, ið ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf 371085 innan kl. 12.00 mánadagin 10. nov.

Um onkur ynskir bil á valstaðið, kann ringjast til ein av hýruvognunum.

Minnist til at hava valkortið við.

**Tvøroyrar Kommuna**
**Tvørávegur 37**
**800 Tvøroyri**

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Skrivari til landsstýriskvinnuna í almannamálum.**

Eitt fulltíðarstarv sum skrivari hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum og aðalstjóranum í Almannamálaráðnum, er leyst at seta skjótast til ber. Sí heimasíðuna hjá Almannamálaráðnum, www.ahr.fo

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 00 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHR@AHR.FO



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**